# Veðrið



**Fimmdaga-forsøgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi ella av ymsum ættum og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið Hvítusunnudag:**
Lot til andøvsgul av landsynningi og ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið 2. Hvítusunnudag og týsdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og landsynningi, sum frálíður hvassur vindur og regn. Seinni hvassur vindur av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 8 og 12 stig.



*– Hetta er júst ein av teimum lutum, sum nýggja barnagarðslógin leggur upp til. Vit eru fegin um, at vinnulívið á hendan hátt eisini er við til loysa trupulleikan við barnaansing, sigur Leivur Hansen, borgarstjóri í Havn*
**savnsmynd**

# Eitt stórt framstig

*Leivur Hansen, borgarstjóri í Havn, er fegin um stigið, sum Føroya Tele hevur tikið í samband við barnaansing*

JAKUP MØRK

Í blaðnum í gjár skrivaðu vit, at Føroya Tele í løtuni arbeiðir við ætlanum um at seta á stovn egna barnaansing.

Okkum eydnaðist tá ikki at fáa fatur á umboðum fyri býráðið, men sum skiltist á telestjóranum, Andras Róin, so hevði býráðið verið sera positivt mótvegis ætlanini.

## Fegnast

Í gjár hittu vit so Leiv Hansen, borgarstjóra, á máli, og einki er at ivast í, at hann er fegin um ætlanina hjá Føroya Tele:

- Hetta er júst ein av teimum lutum, sum nýggja barnagarðslógin leggur upp til, og einki er at ivast í, at vit eru fegnir um, at vinnulívið á hendan hátt eisini er við til loysa trupulleikan við barnaansing.

Í fjør vóru vit komin heilt langt við samráðingum við ein bólk av virkjum, sum høvdu tikið seg saman, men ætlaninar vóru tá kortini av ongum.

Vinnan verður tó á ongan hátt einsamøll um at loysa trupulleikan, tí býráðsformaðurin sigur, at kommunalu myndugleikarnir so avgjørt eru sinnaðir at hjálpa til í hesum sambandi.

Enn er tó ikki avgjørt, hvussu fíggjarliga byrðan skal býtast í hesum sambandi, men væntandi verður hetta avgjørt innan alt ov langa tíð. Komandi týsdag verður fundur i sosialu nevnd, og har er júst hetta mál ein partur av skránni.

Leivur Hansen sigur, at enn er einki avgjørt í so máta, men hann vísur samstundis eisini á, at í Danmark hevur skipanin vanliga verið tann, at virkini sjálv útvega høli, meðan raksturin so verður goldin av kommmununi, foreldrum og virkjunum í felag. T. v. s eina líknandi skipan, sum hevur verið galdandi higaril millum land, kommunu og foreldur.

Borgarstjórin heldur, at tað er av alstórum týdningi, at ein rættvísur býtislykil verður funnin beinanvegin, tí einki er at ivast i, at hetta mál kemur at skapa karmarnar, sum virkast skal innan fyri komandi tíðina.

– Treytirnar, sum verða galdandi fyri eitt møguligt samstarv við Føroya Tele, koma uttan iva at verða galdandi, um onnur virki í framtíðini taka somu avgerð, og tí er tað av alstórum týdningi, at ein skilagóður býtislykil verður funnin alt fyri eitt.

## Stórur íløgutørvur

Ein av størstu forðingunum, fyri at býráðið ikki einsamalt megnar at loysa trupulleikan við barnaansing, er stóri íløgutørvurin, sum er knýttur at hesum.

Leivur Hansen vísur á, at ein barnagarður kostar einar 6 til 7 milliónir at byggja, og at hetta sjálvandi er ein stórur biti, nú kommunurnar hava fingið ein íløgukarm at virka innanfyri.

- Íløgukarmurin hjá Tórshavnar Kommunu er góðar 60 mió.kr., og av hesum fer Tórshavnar Havn avstað við einari helvt í ár, sigur Leivur Hansen. – Havnin fer tó ikki framhaldandi at taka ein somikið stóran bita av køkuni, men vit hava í løtuni íløguynskir á borðinum fyri hundraðtals milliónir. Alt hetta setir sjálvandi eina avmarking fyri, hvussu skjótt vit einsamøll kunnu loysa trupulleikan við barnaansing, og tí eru vit sera fegin um stigið, sum Føroya Tele nú hevur tikið, sigur Leivur Hansen at enda.




Lágtrýstið vestanfyri Írland fer í landnyrðing norðan.




Lágtrýstið í útsynning úr Føroyum fer í landnyrðing og lágtrýstið eystanfyri Hvarvið fer í ein eystan.




**Hitalagið mált frá 07./06. kl 06⁰⁰–08./06. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,9°C**
Minsti hiti máldur í juni: **0,0°** Mesti hiti máldur í juni: **20,0°**




Avfallið: 0,3 mm – **mált frá 07./06. kl 6⁰⁰–08./06. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í juni: 0,6 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 15 |
| Nuuk | 1 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | 10 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 9 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 17 |
| Tromsø | 9 |
| Bergen | 10 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 10 |
| Keypmannahavn | 10 |
| Helsinki | 11 |
| Moskva | 17 |
| Berlin | 16 |
| Warzawa | 17 |
| Kiev | 18 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 17 |
| Madrid | 23 |
| Róm | 20 |
| Malorca | 26 |
| Athen | 28 |
| Malta | 28 |
| Tunis | 25 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | 25 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | – |
| New York | – |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 13 |

## Vestfalskyrrindi

3. juni: Mánin næstur jørðini
9. juni: Fyrra kvarter

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/ Sundalagnum fp | sp | Vestmanna-sundi fp | sp | Mykines-firði fp | sp | Nólsoyar-firði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/ Svínoyarfirði fp | sp | Hvanna-sundi fp | sp | Fugloyar-firði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 9. juni | 0.16 | 12.52 | 11.52 | – | – | 12.07 | 2.16 | 14.52 | 3.16 | 15.52 | 11.07 | 23.43 | 10.07 | 22.43 | 0.31 | 13.07 | 1.31 | 14.07 | 0.01 | 12.37 | 1.16 | 13.52 |
| 10. juni | 1.28 | 14.05 | 0.28 | 13.05 | 0.43 | 13.20 | 3.28 | 16.05 | 4.28 | 17.05 | – | 12.20 | 11.20 | 23.57 | 1.43 | 14.20 | 2.43 | 15.20 | 1.13 | 13.50 | 2.28 | 15.05 |
| 11. juni | 2.42 | 15.19 | 1.42 | 14.19 | 1.57 | 14.34 | 4.42 | 17.19 | 5.42 | 18.19 | 0.57 | 13.34 | – | 12.34 | 2.57 | 15.34 | 3.57 | 16.34 | 2.27 | 15.04 | 3.42 | 16.19 |
| 12. juni | 3.51 | 16.18 | 2.51 | 15.18 | 3.06 | 15.33 | 5.51 | 18.18 | 6.51 | 19.18 | 2.06 | 14.33 | 1.06 | 13.33 | 4.06 | 16.33 | 5.06 | 17.33 | 3.36 | 16.03 | 4.51 | 17.18 |

Kelda: Skipalistin 2000

KLINIKK FYRI FÓTTERAPI
STATSAUTORISERET FODTERAPEUT
Dagmar Andrea Svabo
TJARNARDEILD 2
FEDERATION INTERNATIONALE DES PODOLOGUES
TEL 31 07 27